gult cyan magenta svart



# Glottar vóru at hóma

*Hóast føroyska liðið sum heild hevði ein so-nevndan off-day, so vóru tó eisini onkrir glottar at hóma . Heildar-metingin verður tó sjálvandi sam-svarandi úrslitin-um, sum ikki var nóg gott hesa ferð*



*Fram um nakran annan var tað Øssur Hansen, sum skaraði burtur úr, tá mett verður um avrikini hjá føroysku spælarunum leygardagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Jákup Mørk

**Jákup Mikkelsen, Herfølge BK**
**16 dystir/0 mál**
Landsliðsmálverjin hevði stutt undan landsdystinum staðið ein branddyst fyri felag sítt, og hetta gjørdi hann eisini leygardagin. Einar tvær tríggjar av bjarginum hansara vóru í sonnum heimsklassa, og uttan hesar, kundi talan verið um eitt satt skrædl. Noyðist tó at taka sveisiska leiðslumálið á sín kappa, og hevði annars eisini í øðrum førum trupulleikar av høgum bóltum.

**Óli Johannesen, AGF**
**47/1**
Hevði sum verjuskipari úr at gera í ótryggu føroysku verjuni, og tað var ofta, at hann sum seinasti verjuskansin fekk forða sveisarunum í at gerast heilt vandamiklir. Taldist so avgjørt millum teir betru á føroyska liðnum, men tað telur kortini frá, at hann sum verjuskipari ongantíð megnaði at flyta liðið longur niðan á vøllin.

**Hans Fróði Hansen, Sogndal**
**14/1**
Leirvíkingurin telist vanliga millum tryggastu føroysku leikararnar, men hesu ferð hevði hann stórar trupulleikar gjøgnum so at siga allan dystin. Hevði sera ilt við at fylgja Türkyilmaz, og gjørdi serliga í byrjanini nógv fríspørk. Uppgávan gjørdist heldur ikki lættari av, at verjan ofta varð undirmannað, tá miðvøllurin slepti markeringunum, men sannførandi var avrikið ongantíð.

**Jens Kristian Hansen, B36**
**37/2**
Eins og miðverjufelagin, Hans Fróði, hevði føroyski liðformaðurin stórar trupulleikar við at fylgja sínum manni, og longu undan útvísingini hevði hann fingið gult kort, tá Chapuisat rundaði hann uppi á miðjuni. Samanumtikið var talan so avgjørt ikki um ein dyst, sum liðskiparin fer at minnast fyri nakað positivt.

**Johan Byrial Hansen, OB**
**1/0**
Eftir at hava sitið á beinkinum allan dystin móti Slovenia, slapp Johan hesu ferð rættiliga inn í landsliðshitan.

Eftir eina heldur nervatyngda byrjan, har skeivu sendingarnar vóru heldur nógvar í talið, fall hann tó hampuliga væl til á liðnum, og av teimum trimum uppdekkarunum, var hann helst tann, sum kom best frá síni uppgávu. Fór tó eisini nakað niður, saman við restini av liðnum, men roknast skal tó ikki við, at hetta var einasti landsdystur hansara.

**Allan Mørkøre, HB**
**52/1**
Hevði allan dystin alstórar trupulleikar í verjupartinum, har hann ferð eftir ferð varð yvirspældir, tá sveisararnir fingu skapt sær yirtalsstøður, tí markeringarnar ikki vóru nóg góðar á miðvøllinum. At hann soleiðis varð svikin av miðvøllinum, hevði eisini við sær, at hann at kalla ongantíð fekk høvi at taka lut í álopspartinum, sum annars er sterkasta síða hansara.

Fekk dystarmetið á landsliðnum leygardagin, men vónandi verða tað aðrir dystir í framtíðini, sum Allan fer at minnast betri enn hendan.

**Sámal Joensen, Leiftur**
**19/0**
Hevur verið smáskaddur seinastu tíðina, og hetta sást eisini aftur í avrikinum. Kom at kalla ongantíð inn í vanliga leiklut sín sum uppruddari, og saman við liðfeløgunum á miðvøllinum, má hesin dystur avgjørt teljast millum teir keðiligu hjá gøtumanninum.

Útskiftingin tóktist náttúrlig, tí um tað mundi tóktist ikki at vera nógv eftir í beinunum.

**John Petersen, Leiftur**
**28/3**
Byrjaði dystin við buldur og brak, tá hann skelkaði heimaáskoðararnar við at leggja Føroyar á odda.

Eftir málið var tað tó millum lítið og einki, sum sást til skálamannin. Tóktist darvaður av skaðanum, sum hann hevur drigist við seinastu tíðina, og megnaði ikki at útfylla vanliga leiklutin, har hann í stóran mun er aksilin á miðvøllinum, sum spælið snarar um.

**Julian Johnsson, Kongsvinger**
**36/1**
Eins og vanligt, so rann Julian eina rúgvu av kilometrum, men hinvegin var tað merkiliga lítið, sum kom burtur úr renningini hesu ferð.

Var í fleiri førum beinleiðis sløsutur við bóltinum, og átti hann sín lut í fyrsta og fjórða málinum hjá sveisarum.

Skuldi ætlandi vera eitt slag av bylgjubrótara í álopspartinum hjá okkara monnum, men sæð burtur frá teimum fyrstu fimm ella tíggju minuttunum, slapp hann als ikki framat, tí hann saman við restina av liðnum lá ov aftarliga á vøllinum.

**Øssur Hansen, B68**
**41/2**
So avgjørt størsta ljóspunktið í dystinum. Tær álopsroyndir, sum føroyingar høvdu, fóru so at siga allar ígjøgnum hansara megin, og hann má sigast at vera einasti føroyingur, sum hevði yvirtak mótvegis beinleiðis mótstøðumanni sínum. Hesin varð eisini skiftur út, seinni í dystinum, men eisini móti nýggja manninum setti Øssur sítt merki á dystin.

Sum sagt var toftamaðurin størsti føroyski glottin, og tað var týðuligt, at honum hóvaði væl leiklutin í vinstru, har hann varð bakkaður upp av Johan.

**Uni Arge, ÍA**
**32/7**
Var settur á eina sanna uriasuppgávu í álopinum, har hann at kalla allan dystin var púra einsamallur í vælvaksnu sveisisku verjuni.

Hann royndi tó at stríðast av allari makt, men tað var tó sjónligt, at hugurin minkaði, so hvørt sum dysturin tók at halla. Átti sín lut í føroyska málinum, og kundi við eitt sindur av neyvleika havt pyntað um úrslitið móti endanum.

Yvirhøvur er tað tó torført at meta um avrik hansara, tí satt at siga fekk hann einki gjørt einsamallur.

**Rógvi Jacobsen, KÍ**
**5/0**
Fekk eina hampuliga løtu á vøllinum, men megnaði ongantíð at seta nakran dám á dystin.

Tað ráddi tá bert um hjá føroyska liðnum at halda tapinum niðri, so nakað veruligt fótbóltsspæl gjørdist ongantíð talan um, og tí er grundarlagið fyri einari meting av avrikið hansara ov tunt.

**Jóhannis Joensen, HB**
**8/0**
Kom eins og Rógvi inn á vøllin í seinna hálvleiki, men eisini í hesum føri tykist grundarlagið fyri einari meting at vera ov tunt.








# Italia var ov stórur biti

*U-18 landsliðið tapti stórt ímóti italsku vertunum. Venjarin heldur, at 6—0 var ov nógv, tá hugsað verður um spælbýti*



*Vónandi fer tað at ganga betur hjá U-18 landsliðnum komandi dystirnar*

Tað var ikki við bestu vónunum, at føroyska U—18 landsliðið leygardagin fór á vøllin vøllin í Osimo í Italia. Italsku vertirnir høvdu í summar vunnið EM kappingina, og sjálvt um teir nú hava eitt nýtt lið, so var tað greitt, at talan fór at verða um ógvuliga stóra mótstøðu hjá føroysku unglingunum.

Italia vann 6—0. Tað var als eingin ivi um, hvat liðið var tað betra, men venjarin hjá føroyska liðnum, Jógvan Martin Olsen, er ikki nøgdur við støddina á tapinum:

— Vit taptu við í hvussu so er tveimum málum og nógv. Okkara hava tveir risa stórar møguleikar at fáa mál, men teir eru ikki nóg neyvir og avgjørdir, tá tað mest ræður um. Og tvey av italsku málunum vóru púra óneyðug, tí tey stóðuast av persónligum mistøkum, sum ikki eiga at koma fyri á hesum støðinum, sigur Jógvan Martin Olsen úr Italia.

### Leingi lítil munur

Italsku spælararnir koma úr kendu feløgunum har niðri. Málverjin var úr Roma, og útispælararnir vóru úr Napoli, Milan, Inter, Torino, Juventus, Parma, Bologna og Genoa. Onkrir teirra spæla longu í bestu italsku deildini. Italiumenninir vóru skjótari og bólttryggari, og teir fingu skjótt hol á. Eftir uppspæl í høgru og innlegg skoraðu teir í sjeynda minutti.

Føroyingarnir royndu at leggja sær eina við ikki at sparka, men heldur at spæla fótbólt. Mótstøðumenninir høvdu bóltin meiri, men tað eydnaðist føroyingunum at vera við, og eftir eitt korter var tað um reppið, at teir javnaðu. Hjalgrím Elttør fór til baklinjuna í høgru, men ólukkutíð fekk Fróði Jóanesarson akkurát ikki fatur á innlegginum.

Síðstu løtuna av 1. hálvleiki økti Italia tvær ferðir. Í 41. minutti øktu teir til 2—0. Tað var upp á beinleiðis fríspark, og føroysku spælararnir vóru í hesum sambandinum rættuliga illa við. Jón Rói Jacobsen, sum var sterkur í miðverjuni, tóktist vinna luftbólt á markinum til brotsteigin. Ukreinski dómarin bríksladi fyri frísparki til heimaliðið. Føroyingarnir gjørdu manngarð, ein italiumaður stillaði seg í verjugarðin, hann togaði ein av føroysku spælarunum niður. Dómarin tóktist ganga ímóti ástaðnum, og meðan føroyingarnir bíðaðu eftir, hvat hann fór at døma, smekkaði ein frísparksbóltin í holið, sum var komið í verjugarðin.

Í yvirtíðini av 1. hálvleiki økti Italia til 3—0. Teir spæla eitt tvey við ein av álopsmonnunum, sum leggur út frá aftur, og langskotið fer í málið aftanfyri Pól N. Joensen.

At tvey mál komu síðstu løtuna undan steðginum kendist sera meint, tí italiumenninir høvdu harvið fingið meiri enn fulla úrtøku burturúr fáu møguleikunum.

### Tætt í hálvan tíma

Jógvan Martin Olsen sigur seg vera væl nøgdan við avrikið fyrsta hálva tíman av 2. hálvleiki:

— Tølini siga, at vit taptu 6—0, og harvið mugu vit boyggja okkum fyri, at mótstøðumenninir vóru væl betri. Men tað var bara í heilt stuttum pørtum av dystinum, at munurin kom til sjóndar. Fyrsta lítla hálva tíman av 1. hálvleiki vóru okkara sera væl við, og tað vóru upplagdir møguleikar at gera mál. Símun Joensen hevði gott langskot, sum fór dygst omanfyri. Tá vóru tíggu minuttir farnir. Fimm minuttir seinni legði Brynjolvur Nielsen hornaspark innfyri úr vintru, Símun Joensern var hægstur, men stútarin varð bjargaður á málstrikuni. Tað var sera harmuligt, heldur venjarin, sum vil vera við, at Jón Rói Jacobsen eitt stórt korter út í 2. hálvleik var snøttur fyri eitt brotsspark, tá hann eftir horna varð trøstur í ryggin.

— Tað kunnu vit kanska tosa um, men tað var eingin ivi um brotssparkið, tá Jann Ingi Petersen varð feldur, eftir at okkara høvdu spælt seg ígjøgnum í høgru. Tá vóru 29 minuttir farnir av seinna umfarinum, men tað læt ikki í dómaranum, sum eisini tagdi, tá vit eitt sindur seinni mettu, at Hjalgrím Elttør varð feldur, sigur Jógvan Martin Olsen.

Pól N. Joesen bjargaði onkrari góðari italskari roynd, men síðsta stóra korterið fekk Italia trý mál. Teir øktu til 4—0 eftir kiksaða rangstøðufellu. Tá var seinna umfarið 27 minuttir gamalt. Í 80. minutti øktu teir til 5—0. Føroyski málverjin var óheppin, tá hann skuldi tveita bóltin út til Brynjolv Nielsen. Bólturin fór í staðin til ein mótstøðumann, sum lættliga kundi trilla bóltin í málið. Síðsta málið var eisini rættuliga bíligt. Tað restaðu átta minuttir, tá málverjin bíðaði so mikið leingi at taka bóltin, at ein av mótstøðumonnunum fekk pilka bóltin frá honum.

— Í síðsta minuttinum høvdu bæði Fróði Jóanesarson og Bergur Djurhuus púrar upplagdar møguleikar. Teir vóru blankir fyri málinum, men megnaðu ávikavíst at stúta á málverjan og skeivu megin stólpan. Eg eri nøgdur við bóltspælið í stórum pørtum av dystinum, men eg eri sera vónbrotin av, at teir fingu fleiri ov løtt mál, og at vit ikki megnaðu at skora upp á upplagdar møguleikar, sigur Jógvan Martin Olsen.

Seinnapartin í gjár klokkan tvey skuldu føroyingar spæla ímóti Onglandi, og í morgin fara teir at spæla ímóti Andorra.

**jh**

**Føroyska liðið ímóti Italia:**
Pól N. Joensen, B36 — Jann Ingi Petersen, B68 (Atli Gregersen, Randers Freja, 85.), Vagnur Mohr Mortensen, HB, Jón Rói Jacobsen, HB, Brynjolvur Nielsen, NSÍ — Hjalgrím Elttør, KÍ, Niels Joensen, B36, Símun Joensen, liðformaður, KÍ, Bergur Djurhuus, NSÍ — Fróði Jóanesarson, NSÍ, Bjarni Jørgensen, HB (Ragnar Poulsen, B36, 70.)

Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: Karstin Joensen, KÍ, Áki L. Hansen, NSÍ, Atli Danielsen, KÍ, Elfinn Ørvarodd, FS Vágar og Bárður Christiansen, HB.

# Met í brotsspørkum

*Sveisarar fingu trý brotsspørk í ellivu minuttir, teir skoraðu hvørja ferð og øktu tískil úr 2—1 og til 5—1*

Tað kemur næstan ikki fyri í altjóð fótbólti, at eitt lið fær trý brotsspørk ísama dysti, og tað er heilt sjáldsamt, at dómarin innanfyri ellivu minuttir tríggjar ferðir dømir brotsspark til sama liðið.

Men soleiðis var tað í Sveis leygardagin. Heimaliðið fekk brotsspark í 42., 45. og í 53. minutti. Føroyingarnir hildu seg ikki kunna siga nakað um brotsspørkini, sum vórðu dømd ímóti John Petersen og Jens Kristiani Hansen, men teir iðraðu seg um óneyðugu støðurnar, sum bóru brotsspørkini við sær.



*Venjarin hjá sveisiska landsliðnum var væl nøgdur eftir dystin leygardagin* *Mynd: Álvur Haraldsen*

Síðsta brotssparkið varð dømt ímóti Allani Mørkøre. Tann dómin hildu føroyingarnir vera burturvið. Í fyrra lagið tí teir hildu, at tað var mótstøðumaðurin, sum rann inn í Allan Mørkøre og í seinna lagið, tí teir mettu, at samanbresturin var uttanfyri brotsteigin.

Kubilay Türkyilmaz skoraði allar tríggjar ferðirnar. Harvið gjørdi sveisarin, sum hevur ættarbond til Turkalands tað, sum teir rópa reint hattrikk í ellivu minuttir. Tað er í sær sjálvum sjáldsamt, og tað er sera rár hending at gera reint hattrikk upp á brotsspørk og upp á so stutta tíð. Hesin maðurin hevur spælt 53 landsdystir fyri Sveis, og málini leygardagin vóru nummar 28, 29 og 30.

### Glaður venjari

Venjarin hjá sveisiska landsliðnum eitur Enzo Trossero. Sum vera man so skein hann sum sólin eftir dystarlok. Hann ásannaði, at tað var ein stórur skelkur, tá Føroyar kom á odda, men annars tosaði hann mest um, hvussu avrikið leygardagin kann brúkast á útivølli ímóti Slovenia í morgin:

— Eg eri sera væl nøgdur við álopsspælið. Okkara menn fluttu seg nógv og skjótt, og tað skulu teir eisini gera í Slovenia, segði væl hýrdi venjarin.

Um brotsspørkini segði venjarin, at hann mintist eina ferð áður, at eitt lið hevði fingið trð brotsspørk í sama dysti.

— Tað var í kappingini um suðuramerikanska meistaraskapin, at Argentina fekk trý brotsspørk. Munurin frá teimum og til okkara var, at sami maður hjá teimum royndi allar ferðirnar, og hann misnýtti hvørja ferð, brosaði venjarin.

**jm/jh**